# Ein hjálpandi hond til Jógvan við Keldu

HEÐIN MORTENSEN
Borgarstjóri



**Hóast ein ikki eigur at viðmerkja ella svara øllum tí, Jógvan við Keldu vartar upp við dag og dagliga, kenni eg meg tó noyddan at leiðbeina hann eitt sindur, nú hann tykist hava fingið blokkstuðulin úr Danmark fullkomuliga í rangastrúpan.**

Eingin ivi skal vera um, at Jógvan við Keldu er bæði ein royndur og listilærdur politikari, ið dugir serstakliga væl at fáa sín egna kensluborna boðskap fram. Og sigur tú bara eitt sindur og ikki alt, so eydnast tað aloftast allarbest.

Eitt evni, hann dúgliga hevur savnað tankarnar og skrivingina um, er blokkurin ella ríkisveitingin úr Danmark, og í fleiri førum hevur hann roynt at trúttað niður í okkum, at hetta eru pengar, sum havnarfólk fáa at dusa sær við!

Eg ivist onga løtu í, at tað er eydnast honum at fáa fólk í "útjaðaranum" at halda, at fólk í Havn eru reinar ónýttur. Men Jógvan við Keldu skal vita, at slíkt byggir hvørki land, fullveldi ella samanhald.

So fjølment eru vit ikki her á landi, at ein so royndur politikari, ið átti at vitað betri, hevur fyri neyðini at spjaða okkum øll sundur við enntá beinleiðis skeivum og villeiðandi uppháldum.

**Gjørd til útjaðara**

Líkt er til, at tað er um reppið at eydnast Jógvan ivið Keldu at fáa bæði klaksvíkingar og onnur góð fólk uttan fyri Havnina at kenna seg sum "anti-havnarfólk"!

Áðrenn hann fór undir at forbrongla hugtakið um útjaðara, vóru Mykines, Fugloy, Hestoy, Koltur og aðrar útoyggjar útjaðari. Men nú er tað næstan so galið, at sjálvt kvívíkingar og hósvíkingar kenna seg sum útjaðarafólk.

Ein høvuðsorsøk til tað er alt hetta øgiliga júkið hjá Jógvani við Keldu um, at blokkstuðulin heldur lív í Havnini og at hon mestsum hevði verið útdeyð, var tað ikki alt samalt fyri donsku ríkisveitingini.

Onnur hava sagt tað sama í skemti, men hann meinar tað helst í fullum álvara, tá hann breiðir seg út um, hvussu blokkstuðulin lívgar høvuðsstaðin og meira at kalla útarmar restina av landinum.

**Turru tølini**

Snildur, sum hann er, letur Jógvan við Keldu samstundis vera við at fortelja fólki, hvussu stór henda veiting er og hvat hon í veruleikanum verður brúkt til. Kann vera, at hann ikki hevur skil á øllum hesum hundraðtals milliónunum, so tí vil eg fegin royna at hjálpa.

Fyri at byrja við sjálvari støddini, so er samlaði blokkstuðulin úr Danmark 615,5 milliónir krónur, og hann verður útgreinaður soleiðis:

| | |
|---|---|
| Serforsorg | 117,0 mió. kr. |
| Pensjónir | 213,3 mió. kr. |
| Sjúkrahúsverkið | 283,6 mió. kr. |
| Fiskirannsóknarstovan | 1,6 mió. kr. |
| Íalt | 615,5 mió. kr. |

Harumframt veitir danski statskassin blokkstuðul – ella rættari sagt endurgjald – upp á 20 milliónir krónur fyri tænastumannalønir.

Nóg mikið hesa ferð, tí nú haldi eg tað hóska seg best, um Jógvan við Keldu greiðir Føroya fólki neyvt frá, hvussu hann fær tað til, at henda góða hálva milliardin mestsum bara søtar tilveruna hjá havnarfólki!

Nú fæst so sjón fyri søgn, um hann alment og á skrift eisini vil fortelja okkum meiri nágreiniliga, hvar í okkara góða landi allur hesin blokkstuðulin sæst aftur.

# Viðvíkjandi broyting í jarðarlóggáðuni, sum í løtuni er fyri í Løgtinginum

ÓLI J. MÜLLER
Tórshavn

Tað er áhugavert at lurta eftir okkara fólkavaldu løgtingsfólki, tá tey umrøða sína hugsan um, hvussu tey kundu hugsað sær, at jarðabrúk, eftir teirra tykki, skal fara fram í Føroyum framyvir.

Tað er týðuligt at hoyra, at her eru ikki nógvar stemmur at heinta, og at fólk, sum hava landbúnaða sum livibreyð, ikki hava eitt sterkt fakfelag aftan fyri seg.

Føroyar eru soleiðis háttaðar, at fjøllini og líðirnar eru gott beiti til seyð, neyt og ross, meðan tað er í láglendinum, at dyrkilendi finnst, og verður nýtt til at velta. Hetta er soleiðis grundarlagið fyri grasframleiðslu og mjólkarframleiðslu. Uttan dyrkilendi verður ongin mjólkarframleiðsla.

Har sum neytahald er, er neyðugt at hava útrakstur, beiti, sum neytini kunnu sleppa út á og at røra seg.

Nú er tað so, at summir fólkavaldir kommunulimir heldur vilja sleppa eftir veltari jørð at stykkja út til húsabygging o.a., fram um jørð, sum ikki er so væl egnað til velting.

Ein politiskur flokkur, Kári P.Højgaard, helt, at ein kommuna skuldi fáa heilar hagar, sum teir frítt kundu disponera yvir.

Ein borgmeistari, Heðin Zachariassen, helt, at tað var ov so rívan tikið til, og helt, at kommunurnar bert skuldu hava loyvi til at frítt at ogna sær tað lendi teir sjálvir vildu, tá teir vildu.

Í Vikublaðnum stóð at lesa herfyri, at "Tórshavnar Kommuna keypir Suðurstreymoy". Minni kann ikki gera tað.

Eg dugi ikki rættuliga at skilja, hvat T. Kommuna skal við allari Suðurstreymoynni uttan so, at leiðslan har hevur fingið álvarslig trupulleikar av propertiónsforvirring. Tórshavnar kommuna eigur, sum fyrr nevnt, allan Flatnarhaga. Av tí velduga lendinum, hevur kommunan lítið og eingi brúkt til byggilendi, meðan hon í staðin hevur otað seg inn á lendið, sum hon einki eigur í.

Tað, sum er neyðugt hjá Løgtinginum at gera, er at løggeva soleiðis, at øll dyrkað jørð fær frið fyri alla framtíð, og somuleiðis øll jørð, sum er dyrkibar eisini far frið í allari framtíð.

Hvat halda tit, at okkara eftirkomarar fara at siga, tá alt dyrkilendi er oyðilagt, asfalterað. Tit skulu ikki rokna við, at peningur fer at flóta inn í landið í allar ævir, og at tit bara kunnu senda boð til Danmark, Ísland v.m. eftir tí, sum jørðin kann framleiða.

Tað er eingin, sum saknar jørð, sum ein ongantíð hevur átt.

So leingi, sum fólk kunnu gera eina útstykkingarætlan, hvar tey hava hug, og so fara ein túr niðan á búnaðarstovuna at fáa ætlanina góðkenda og keypta fyri lítið og lætt, verður skilið ikki ørðvísi. So kemur tað at ganga sum við tí seinasta føroyska tarvinum, sum bleyv skotin, áðrenn hann fekk høvi til at endurnýggja seg. Spell.

Eg veit, at í Noreg ansar myndugleikin allastaðni eftir at nýta vánaligt dyrklendi fram um gott at byggja á. Tað kemur mær fyri, at tað er lóggivið fyri tí, men tað eri eg ikki vísur í

Har liggja húsini upp eftir fjallasíðunum, meðan tær fløturnar, sum eru, liggja so vakrar har.

Havnar Kommuna viðtók at ognartaka um 10.000 m2 av nýveltari jørð av mínum festi (nú hjá soninum) í Havnardali. Ein stemma var ímóti, Beata Samuelsen.

Tað bleiv kært til friðingarnevndina, sum sjálvandi friðaði lendið. Teir vóru jú ikki heilavaskaðir.

Havnar kommuna hevur ríkiligt av lendi at nýta til hvat tað skal vera, uttan at gera seg inn á nýveltan bø, sum er alneyðugur fyri framleiðsluna á garðinum í Havnardali.

Tað er neyðugt, at Løgtingið heldur í oyrunum á kommununum, áðrenn teir oyðileggja meira enn teir longu hava gjørt.

Tað er tí verri soleiðis í Føroyum, at kommunupolitikkarir, sum hava fingið smakkin av makt, ofta enda í løgtinginum, og tað er ógvuliga óheppi. Fólk, sum fyri ein og hvønn prís royna at sleppa í kommunur, løgting ella fram at sessum, sum geva makt, at kalla ongantíð eru teir røttu at taka avgerðir, sum tæna øðrum.

Skeivir politikarir kunnu gera stóran skaða í tey fáu árini, teir sita í almennum størvum.

At trúgva, at tørvurin á grundstikkjum í Havn kann nøktast, er ynskitonkjing. Fleiri hús geva fleiri fólk, sum geva fleiri børn, sum krevja fleiri hús o.s.v. Aftrat koma so barnagarðar, skúlar, røktarheim og alt annað sum fylgir við. Er alt resið tað vert. Hvat við bygdamenning. Hvat við at deila fólk, fyritøkur, arbeiðspláss út um landið.




# Kvøldseta í Mentanarhúsinum

**Kvøldsetusamtakið ætlar at skipa fyri einum tiltaki um mánaðin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

KVØLDSETA
*Tíðindaskriv*

Felagið kvøldsetusamtakið byrjaði í november í fjør við tí høvuðssetningi at skipa fyri einum tiltaki í Mentanarhúsinum um mánaðin. Sí annars heimasíðuna hjá felagnum *www.123hjemmeside.dk-kvoldsetur*

**Fríggjadagin 23. mars kl. 20.0**0 verður fimta tiltakið hjá samtakinum við trimum innsløgum á skránni.

Kl. 20.00 fer Poul Jacob Breiðaskarð at spæla harmoniku.

Poul Jacob er fuglfirðingur. Sum ungur fór hann í 1973 til Ísafjarðar í Íslandi at arbeiða, har giftist hann og gjørdist hann limur í Harmonikufelag Vestfjarðar. Í 2001 fluttu Poul Jacob og konan aftur til Føroya. Hetta er fyrstu ferð, Poul Jacob spælir alment her á landi, so tað verður forkunnugt at hoyra.

Kl. 20.30 spæla og syngja Lylli og Niels.

Teir báðir fara at syngja nakrar Taube umsetingar, millum annað ein nýggjan grækarismessusang, sum er umyrktur av "Vals i Gøkotten" hjá Evert Taube. Og við tað at vit eru mitt í føstuni, fara teir eisini at syngja tveir føstusálmar, ein við lagi úr Tjørnuvík, og ein við lagi úr Oyndarfirði.

Kl. 21.00 fer Manskórið í Tabor at syngja og spæla.

Manskórið í Tabor varð stovnað í vetur, og tað er Poul Jacob Lundsbjerg, sum leiðir kórið. Poul Jacob er kendur sum tann harmonikuspælarin um okkara leiðir, sum dugur best at fáa lív í løgini, hann spælir. Saman við honum taka Evert Jacobsen á gittara og Jacob Eliasen á ljómborði sær av fylgispælinum. Manskórið syngur mest góðar gamlar missiónssangir.